


*Tróndur Kragesteen, miðbakkur*

# Nakrar eygleiðingar eftir dystin í Monte Negro

**Samandráttur av práti við Inga Olsen, venjara og leikara**

Tá ið leikarar okkara seinasta leygardag fóru á vøllin hjá hondbóltsfelagnum Lovcen í býnum Cetinje í Monte Negro, vistu vit lítið um mótstøðuliðið. Vit høvdu hoyrt okkurt um rokaligar dystir í Evropa Cup kappingini fyri nøkrum árum síðani og at liðið annars var sterkt. Onkur hevði hoyrt frá heimligum jugoslaviskum, nú serbiskum leikara, at tá ið gamla Jugoslavia var til, óttaðust øll hini liðini í kappingini at leika dyst júst í Cetinje í Monte Negro, í móti Lovcen. Tað skuldi vera sum at koma í ein heksaketil. Í Lovcen er hondbóltur høvuðsítróttin og felagið hevur nógvar áskoðarar, sum fult og heilt stuðla liði sínum. Hetta seinasta fingu leikarar okkara eisini at kenna og gangurin frá heimaáskoðarunum var øgiligur og ikki var altíð líka lætt at leika, tí hvørja ferð vit høvdu bóltin, fór áskoðarafjøldin at floyta og bua.

**Dysturin í Monte Negro:**
Fyrsta málið í dystinum var okkara. Men síðani skoraði Lovcen 5 ferðir, áðrenn tað aftur bragdaði hjá okkum. Og hetta var ikki tí, at vit ikki høvdu møguleikarnar, tí vit megnaði at spæla okkum til nógvar upplagdar málmøguleikar og høvdu vit ikki misnýtt teir, kundi støðan eins væl verið 5-5. Men trupulleikin var tann, at vit fingu ikki mál, annaðhvørt tí, at málmaðurin hjá Lovcen stóð serliga væl, ella tí at leikarar okkara henda dagin ikki vóru nóg neyvir í skotroyndunum.

Sum dysturin leið, bara øktist munurin og tá ið komið var til hálvleiks, var støðan 20 til Lovcen og 10 til okkara. Í minsta lagi helvtin av málunum hjá Lovcen komu eftir miseydnaðar atsóknir hjá okkum, har bólturin annaðhvørt endaði í verjuni ella hjá málmanninum og so fóru Lovcenleikararnir í skjótálop móti málmonnum okkara, sum vóru prísgivnir. Í seinna hálvleiki gekst lutfalsliga betri, teir skoraðu 15 og vit 11, so úrslitið tilsamans gjørdist 35-21 til Lovcen.

Nú stendur so heimadysturin fyri durum. Tað merkir, at vit fáa ein nýggjan møguleika at vísa hvør dugur er í okkum. Og tað er einki at ivast í, at fara vit á vøllin við avgjørdum huga og gagnýta tað, sum vit lærdu í fyrra dystinum, vera effektivir í avgerandi løtunum, so kunnu vit fáa eitt gott úrslit leygardagin. Fyrst og fremst mugu vit fáa mál upp á teir uppløgdu møguleikarnar. Um verjupartin er at siga, at burtursæð fra skjótálopunum, stóð verjan væl og vit megnaðu demma upp fyri flestu skotunum. Skjótálopini hjá teimum mugu vit so í mestan mun royna at avmarka.

Eftir eitt slíkt tap, sum vit vóru útfyri leygardagin, kemst ikki undan at koma inn á spurningin, hvør meining tað er í at leika dystir móti so sterkum mótstøðuliðum. Men her svarar Ingi avgjørdur, at skal framgongd vera í føroyskum hondbólti, er avgerðandi neyðugt at lið okkara fáa slíkar uppgávur. Sum dømi nevnir hann, at motivatiónin hjá monnum at venja í summar hevur verið sera góð og sjálvandi er orsøkin, at spennandi uppgávur hava ligið fyri framman, umframt Monte Negro, hava vit eisini verið í Íslandi á venjingarlegu.

Áskoðarar okkara fara neyvan at nýta somu "vápn", sum tey hjá áskoðarunum í Monte Negro. Vit vóna heldur, at øll á positivan hátt gera sítt til at eggja okkara leikarum til at gera sítt besta.

**Jón Kragesteen**